

*Seks ferðir hava føroyingar luttikið í undankappingunum til Eurovision Song Contest. Annika Hoydal luttók í donsku undankappingini 1979 við sanginum »Aldan«. Pætur við Keldu í 2002 og The Dreams í 2008. Eivør luttók í íslendsku undankappingini í 2005 og Jógvan Hansen í 2009. Brandur Enni luttók í svensku undankappingini 2008.*

# **FØROYAR** VIÐ Í GRAND PRIX **?**

ANNIKA MITTÚN, STJÓRI Í KRINGVARP FØROYA, VÁTTAR, AT TEY HAVA KANNAÐ MØGULEIKARNAR FYRI, AT FØROYAR KUNNU TAKA LUT Í EUROVISION SONG CONTEST. GRØNLAND ER HVÍLANDI LIMUR Í EBU, OG FLEIRI MINNI LOND, SUM TIL DØMIS VATIKAN-STATURIN, ERU LIMIR.



**TÓNLEIKUR**
**Inna Tørnroos**
inna@sosialurin.fo

Kringvarpið hevur kannð møguleikarnar fyri, at Føroyar kunnu gerast limur í EBU, Eurovision Broadcasting Union, og harvið luttaka í Eurovision Song Contest.

Svenskarin Svante Stockselius er leiðandi stjóri fyri ESC, Eurovision Song Contest í løtuni. Hann heldur ikki, at markið er nátt fyri talið av londum, sum kunnu luttaka í kappingini.

– Vit hava gjørt reglurnar um, so at fleiri lond kunnu verða við, sigur Svante Stokselius.

Fleiri lítli lond sum Lichtenstein, San Marino og Malta eru við í kappingini, men felags fyri tey er, at tey eru aktivir limir í EBU og sjálvstøðug lond.

– Vit eru limir í EBU gjøgnum Danmarks Radio og nýta eisini tilfar frá hvørjum øðrum, sigur Eyðfinn Jensen í Kringvarpinum.

Annika Mittún er regluliga við á fundum hjá EBU. Men tað kostar at gerast sjálvstøðugur limur, og tí hevur Kringvarp Føroya valt ikki at gerast limur.

– Vit hava kannað møguleikarnar at luttaka í Eurovision Songcontest fyri ung, og so taka tað harfrá, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Eyðfinn Jensen ivast ikki í, at Føroyar høvdu klárað tónleikaligu avbjóðingina at vera við í Eurovision Song Contest uttan trupulleikar.

Føroyingar hava luttikið í bæði Íslendsku, donsku og svensku undankappingunum, men enn er ikki eydnast nøkrum at koma víðari til finaluna.

– Eg haldi avgjørt, at tit kunnu søkja um at gerast limir í EBU, sigur Svante Stockselius, leiðandi stjóri fyri ESC.

## Hesi 39 lond eru við og kappast í Oslo

**Albania** – »Nuk mundem pa ty við Juliana Pasha«
**Armenia** – finala í februar
**Azerbajdzjan** – finala í februar
**Belgia**
**Bosnia-Herzogovina**
**Bulgaria**
**Kypros** – finala 7. februar
**Danmark** – finala 6. februa
**Estland** – finala 6. mars
**Finland** – finala 30. januar
**Frakland**
**Georgia**
**Grikkaland** – finala. 19. februar
**Írland** – finala í mars
**Ísland** – finala 6. februar
**Ísrael**
**Kroatia** – finala 6. mars
**Lettland** – finala 27. februar
**Litava**
**Makedonia** – finala í februar
**Malta** – finala 20. februar
**Moldava**
**Holland** – »Ik ben verliefd við Shalalie«
**Noreg** – finala 6. februar
**Póland** – finala 14. februar
**Portugal** – finala 6. mars
**Rumenia** – finala 6. mars
**Russland** – finala 7. mars
**Sveis** – »Il pleut de l'or við Michael von der Heide«
**Serbia**
**Slovakia** – finala 28. februar
**Slovenia** – finala í mars
**Spania**
**Stórabretland**
**Svøríki** – finala 13. mars
**Turkaland**
**Týskland** – finala 12. mars
**Ukraina** – Vasyl Lazarovich
**Hvítarussland**

## Noreg vertur í ár

Eurovision Song Contest – ella vanliga kallað Grand Prix – verður í ár hildin í Telenor Arena í Oslo. Noreg vann seinasta ár við sanginum »Fairytale« sum Alexander Rybak framførdi.

Finalan verður 29. mai, og 25 lond luttaka. Fimm av tveimum eru beinleiðis klár til finaluna - Frakland, Spania, Stórabretland, Týskland og verturin Noreg. Hini londini mugu í tvær undanfinalur fyri at kvalifisera seg til finaluna.

Hetta er triðju ferð, NRK er vertur fyri Grand Prix. 1986 var kappingin í Bergen og 1996 í Oslo. Higartil er ikki nógv komið út til fjølmiðlarnar um, hvussu kappingin í ár verður hildin.

Fíggjarkreppan merkist eisini í Grand Prix, og heili fýra lond hava meldað avboð vegna vánaliga fíggjarstøðu. Hesi eru Ungarn, Montenegro, Andorra og San Marino.

Kekkia hevur givið upp, eftir at hava fingið vánalig pláss seinastu tríggjar ferðirnar. Georgia er harafturímóti við aftur, eftir at hava verið burtur eitt ár.



*Svante Stockselius er leiðandi stjóri fyri Eurovison Song Contest.*